Upplýsingarumhvørvið

Framleiðslusíðan

- Etiskar leiðreglur
- Redaktionelt frælsi
- Journalistisk ideal
- Journalistiskir førleikar
- Tøkni (hardward, software)
- Trúvirði
- Eigaraskapur
- Inntøka (public service gjald, miðlastuðul, brúkaragjald, lýsingar, privatur kapitalur)
- Miðlabúskapur (economies of scale)
- Brúkaraframleiðsla (citizen journalism)

Brúkarasíðan

- Uppmerksemisbúskapur (vaksandi nøgd av tilfari)
- Miðlamentan, -vanar og -nýtsla
- Keypiorka (cost-benefit)
- Álit
- Upplýsingarførleiki t.d.
- Talgildur førleiki
- Keldukritikkur
- Miðlaførleiki (atgongd, fatan, meting, skapan)

Støðisnámsætlanin síðani 1. januar 2023

Kt-førleikar og talgildisbúgving

Kt-førleikar og talgildisbúgving snúgva seg bæði um førleikar at brúka ítøkilig, viðkomandi kt-amboð og at skilja amboðini, og í hvørjum samanhangi tey skynsamt kunnu nýtast. Eisini snúgva kt-førleikar og talgildisbúgving seg um atferð á talgildum miðlum og keldukritiska viðgerð av talgildum tilfari. Endamálið er at búgva næmingarnar til at vera virknar, sjálvstøðugar, kritiskar og fólkaræðisligar borgarar í einum talgildum samfelag.

Kt-førleikar og talgildisbúgving kunnu býtast í seks øki:

- Nýtsla
- Fatan og teldulig hugsan
- Metingarevni
- Samskifti og samstarv
- Leitan og viðgerð
- Skapan

Nýtsla fevnir um, at næmingarnir duga at brúka kt-amboð á ein skilagóðan hátt. Í hesum sambandi skulu næmingarnir eisini duga at taka avgerðir um, hvørji amboð eru viðkomandi í einari ávísari støðu.

Fatan og teldulig hugsan snúgva seg um, at næmingarnir læra at skilja og meta um møguleikar og avmarkingar við talgildum lutum og amboðum. Somuleiðis skulu næmingarnir læra at meta um, hvørjar avleiðingar nýtsla av hesum lutum og amboðum kann hava fyri tey og samfelagið rundan um tey. Næmingarnir skulu eisini úr einum etiskum sjónarhorni læra at meta um sambandið millum menniskju og tøknina, og hvussu tey ávirka hvørt annað, og hvørjar avmarkingar teldan hevur.

Metingarevni snúgva seg um ábyrgd og atferð á talgildum miðlum. Næmingarnir skulu læra um trygd, keldukritik og hóskandi atferð og verju av persónligum virðum á talgildum miðlum.

Samskifti og samstarv fevna um, at næmingarnir skulu menna sínar talgildu samskiftis- og samstarvsførleikar, so tey kunnu samskifta greitt og skapa skynsamt samband og gevandi samstarv við onnur.

Leitan og viðgerð fevna um, at næmingarnir skulu læra at finna og ogna sær vitan frá talgildum keldum og viðgera hesar keldukritiskt.

Skapan fevnir um, at næmingarnir læra at nýta kt-amboð saman við sínum skapandi evnum, samstundis sum næmingarnir eisini menna hesi evni. Hetta fevnir eisini um, at næmingarnir fáa grundleggjandi innlit í talgildar skapanartilgongdir.